# BØRN HAVA RÆTT TIL EITT GOTT LÍV

*– tak vandatekin í álvara*



Ein bóklingur til fakfólk um fráboðanarskylduna

# BØRN HAVA RÆTT TIL EITT GOTT LÍV

Við hesum faldara vilja vit varpa ljós á barnaverndartænastuna sum samstarvspart, tá tú av álvara gerst stúrin um eitt barn.

Tá ein námsfrøðingur, lærari, heilsufrøðingur, ljósmóðir, kommunulækni ella onnur, sum hava tætt samband við børn halda, at einum barni og familjuni tørvar hjálp, skal barnaverndartænastan hava boð um hetta.

Umsorgan fyri einum barni kann sostatt hava við sær, at tú mást boða barnaverndartænastuni frá, hvussu til stendur.

Dygg og munagóð hjálp í tøkum tíma kann byrgja fyri álvarsligarum inntrivum seinni í uppvøkstrinum, og tí eigur tú at tosa við tínar starvsfelagar og við barnaverndartænastuna um støðuna.

Okkara áheitan er tí: eru tekin um, at eitt barn ikki hevur tað gott heima, tak so ábyrgd av, at barnið og familjan fær ta hjálp, ið tørvar.

## Innihald

Í hesum faldara verður greitt frá teimum avbjóðingum og møguleikum, ið eru , tá tú vil hjálpa einum barni, ið møguliga hevur verið fyri umsorganarsvíki. Til ber at lesa um:

- **Serligu ábyrgdina**
- **At taka vandatekin í álvara**
- **At greiða frá tíni stúran**
- **At boða barnaverndartænastuni frá**

Tað er av stórum týdningi, at dagstovnar, skúlar og onnur, ið eru um børnini, hava eina felags fatan av, hvussu farið verður fram, um tú ella ein av tínum starvsfeløgum gerast varir við eitt barn, sum hevur trivnaðartrupulleikar orsakað av viðurskiftum heima við hús.

Fyrsta stigið er at finna fram til, hvussu tit í felag gera leiðreglur á hesum øki, um tit ikki longu hava slíkar. Hetta kann eitt nú verða gjørt á starvsfólkafundum og á foreldrafundum.

## Lógin um barnavernd

**§ 14**. Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti, ella hava orsøk til at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum.

Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari vanrøkir, meinslar ella misnýtir eitt barn, ella at barnið á annan hátt livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða tess sálarligu ella likamligu heilsu ella menning, hevur skyldu til at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin.

Fráboðast skal eisini um kvinnu, ið er við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli t.d. vegna rúsevnismisnýtslu, sosialum ella sálarligum ávum.

Barnaverndartænastan skal sum skjótast, og seinast innan eina viku, ganga ígjøgnum innkomnar fráboðanir og meta um, hvørt kanningar skulu setast í verk.

Barnaverndartænastan skal boða fráboðara frá, hvørt um fráboðanin er móttikin.

. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .

Fráboðanarskyldan ber í sær, at tú hevur skyldu at gera vart við teg, eisini tá tú bert hevur varhugan  av, at eitt barn livir undir umstøðum, ið skaðar teirra heilsu og menning

Tá um ræður at verja ófødda barnið, hava starvsfólk innan heilsuverkið eitt serstakt innlit. Mest týðandi fakfólkini eru í hesum sambandi kommunulæknin og ljósmóðirin. Tað er av stórum týdningi, at hesi starvsfólk eru var við barnakonur, ið dragast við

Barnaverndarstova Føroya

SSP Skúli Sosialir myndugleikar Politi

*Við loyvi frá Ankestyrelsen Danmark - 2009*

rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu, sosialum ella sálarligum ávum, og sum hava tørv á leiðbeining ella stuðli. Um rúsdrekka- og rúsevnismisnýtsla ella aðrir trupulleikar hótta heilsuna hjá ófødda barninum, skal barnaverndartænastan hava fráboðan.

Heilsufrøðingar koma skjótt á vitjan heima hjá nýfødda barninum, og fáa sostatt eitt tilknýti til húskið, ið stendur við í mong ár. Kommunulæknin hevur barnakanningar um hendi og hevur ofta kent familjuna leingi. Um barnið ber tekin um umsorganarsvík, má barnaverndartænastan hava boð um hetta, eisini tá talan bert er um ein varhuga. Starvsfólkini mugu lata við seg koma, um tey gerast stúrin um atburðin ella samspælið millum foreldur og barn, og tá tekin annars eru um mistrivnað.

Námsfrøðingar og onnur starvsfólk innan barnaansingina hoyra til tey starvsfólk, ið fáa innlit í korini hjá børnunum og familjum teirra tíðliga á lívsleiðini. Tey hava tí ein serliga góðan møguleika at síggja, um okkurt ikki ruggar rætt hjá barninum ella í familjuni. Tey, ið starvast í frítíðarskúlum og innan ymisk frítíðartilboð, kunnu eisini koma í samband við børn, ið vísa tekin um mistrivnað. Hjá stórum børnum og tannáringum henda nógvar og stórar broytingar. Tá er neyðugt at geva møguligum teknum um mistrivnað gætur.

Lærarar koma ikki í eins stóran mun í samband við foreldrini og familjuna. Hinvegin eru teir nógv saman við børnunum. Ein næmingur gongur tilsamans einar 2000 dagar í skúla tey fyrstu 10 skúlaárini. Lærararnir hava serliga ábyrgd av fakligu menninigini, men persónliga menningini hjá hvørjum einstøkum næmingi er eisini ein høvuðstáttur í gerandisdegnum á skúlanum.

Sálarfrøðingar og sosialráðgevar, ið javnan eru í sambandi við børn við ymsum trupulleikum, hava eisini skyldu at boða barnaverndartænastuni frá, tá trupulleikarnir krevja hetta.



## Serliga ábyrgdin

Øll hava skyldu at boða frá, um tey koma í samband við børn, ið hava verið fyri umsorganarsvíki ella ágangi. Hjá fakfólki gongur fráboðanarskyldan fram um tagnarskylduna.

## Tak vandatekin í álvara

Tað finnast ongar ávísar leiðbeiningar um serlig eyðkenni ella atburð, ið siga okkum, um vit skulu gera vart við okkum í mun til einstaka barnið. Vit mugu altíð gera eina ítøkiliga meting. Vánaligur trivnaður kann bæði koma av, at barnið er overvað í eina tíð og av, at barnið er hótt. Tí mást tú altíð lata við teg koma, tá tú gerst stúrin um møguligan mistrivnað, so støðan kann kannast nærri.

## Ger nakað hóast iva

Tá tú gerst stúrin um eitt barn, kann tað vera ymiskt, ið ger, at tú ikki letur við teg koma:

Man stúranin bara vera ein illgruni, ið ongastaðni hoyrir heima? Er tað rætt, sum eg síggi? Er vandi fyri, at álit og samstarv millum meg og foreldrini fer fyri bakka? Er vandi fyri, at eg geri støðuna hjá barninum enn verri? Eri eg tann, ið er serliga kallaður at gera vart við meg, ella eru onnur, sum standa barninum nærri? Er tað ein partur av mínum starvi at leggja meg út í nakað, ið snýr seg um trupulleikar heima hjá einum barni? Bróti eg mína tagnarskyldu?

Líkamikið hvat heldur tær aftur, eigur tú at gera vart við teg og gera títt til, at kanningar kunnu verða settar í verk.

## Fráboðanarskyldan fram um tagnarskylduna

Sum fakfólk hevur tú skyldu at taka neyðug stig, um tú sært vandatekin hjá børnum ella húskjum teirra. Tað er umráðandi, at tú ikki – í miskiltum umhugsni fyri foreldrunum – letur vera við at lata tað fara víðari, sum tú hevur sæð.

## Tín fráboðanarskylda gongur fram um tína tagnarskyldu.

Í øllum førum eigur at vera havt fyri eyga, at umsorganin fyri barninum skal vera í fremstu røð.

## Ger nakað í tøkum tíma

Flestu fakfólk duga at síggja, um børn vísa tekin um mistrivnað. Hóast hetta, kemur tað fyri, at tey ikki gera vart við tað á røttum stað. Tað kann vera torført at ásanna, at eitt barn hevur álvarsligar trupulleikar – og ikki minni at seta foreldrini andlit til andlits við tína stúran, ið kann vísa seg at vera ógrundað, tá samanum kemur.

Børn kunnu eisini vísa atburð, ið ein kann verða stúrin um, tá umstøðurnar eru truplar, hóast tær ikki eru vandafullar. Talan kann til dømis vera um hjúnarskilnað ella sjúku í familjuni. Útgangsstøðið eigur tó altíð at vera, at einhvør ivi eigur at koma barninum til góðar.

Um tú sum fakfólk ikki tekur vandatekin hjá barninum í fullum álvara og tosar við barnið og foreldrini um tað, sum tú sær, ber ikki til at fáa staðfest, um nakað álvarsligt kann vera á vási. Talan kann vera um eitt hótt barn. Tað er eisini av stórum týdningi, at sett verður inn so tíðliga sum til ber, um barnið bert hevur tørv á eitt sindur av stuðli.

## Týðandi tekin:

- **Barnið hevur ein óskiljandi ella bráðliga broyttan atburð**
- **Barnið tykist vera órøkt**
- **Barnið sýnir líkasælu**
- **Barnið tykist innanbundið**
- **Barnið tykist óttafult**
- **Barnið tykist hava sera ilt við at hugsavna seg**
- **Barnið er bráðsint ella ágangandi**
- **Barnið tykist ikki at vanda sær um sítt samband við onnur**
- **Tað er altíð ein ítøkilig meting, ið avger, um stig skulu takast í hvørjum einstøkum føri.**

# Greið frá tíni stúran

Skal ein góð loysn finnast á trupulleikunum, sum tú bert eygað við hjá barninum, er tað umráðandi, at tú tosar við onnur um tína stúran. Tú skalt tosa við barnið og familjuna, tínar starvsfelagar og møguliga eisini við onnur fakfólk og við barnaverndartænastuna.



## Tak starvsfelagar og leiðsluna við

Tað er eitt gott hugskot at tosa við starvsfelagar og leiðslu um tað, ið tú hevur lagt til merkis. Tað er umráðandi, at tit á arbeiðsplássinum hava gjørt tykkum eina ætlan um, hvussu tit handfara slík mál, tá tey stinga seg upp. Tað er somuleiðis gott, at tit hava kunnleika til møguleikarnar hjá barnaverndartænastuni at hjálpa, um neyðugt.

## Tosa við foreldrini

Foreldur vilja vanliga sínum børnum tað besta. Hóast tey møguliga eru partur av trupulleikanum, eru tey sum oftast eisini ein týðandi partur av loysnunum, ið skulu finnast. Uttan so, at talan er um serstøk bráðfeingis mál, har mett verður, at barnið beinleiðis er í vanda, eitt nú fyri kynsligum ágangi ella harðskapi, skalt tú royna at fáa best møguliga samstarvið í lag við foreldrini.

Tað er gott at byrja eitt samstarv við foreldrini við at tosa við tey um tínar eygleiðingar og tína stúran. Spyr tey, um tey sjálv hava lagt atburðin hjá barninum til merkis, ella um okkurt líknandi er komið fyri fyrr. Ver opin fyri, at tú kanst hava mistikið teg, ella at foreldrini hava eina heilt aðra fatan av støðuni. Halt hóast hetta fast í tínar eygleiðingar. Tað kann vera eitt gott hugskot at skriva tínar eygleiðingar niður, áðrenn tú tosar við foreldrini.

Summi foreldur gerast óð í slíkum støðum. Tað kann tó eisini kennast sum ein lætti hjá foreldrunum, at orð verða sett á ein trupulleika, ið tey ikki hava megnað at loyst einsamøll. Havið fyri eyga, at fráboðanin til barnaverndartænastuna er  fyrsta stigið til, at barnið fær neyðugu hjálpina.

## Tvørfakligt samstarv

Um tú og leiðslan ivast í, um tit kunnu loysa trupulleikarnar í samstarvi við foreldrini, kann tað vera eitt gott hugskot at ráðføra seg við onnur fólk, ið arbeiða við børnum og ungum, og sum síggja málið úr einum øðrum sjónarhorni. Til ber at tosa um viðurskiftini uttan at nøvn verða nevnd, men um eitt ávíst barn verður umrøtt, skulu foreldrini frammanundan geva sítt samtykki til hetta.

## Bráðfeingis støður

Umráðandi er at skyna millum mál, tá barnið er hótt av vanrøkt, harðskapi ella kynsligum ágangi, har neyðug stig mugu takast beinanvegin, og mál, har tú kanst geva tær betri stundir. Í bráðfeingis málum mugu neyðug stig takast beinanvegin. Hetta verður gjørt við, at tú setir teg í samband við barnaverndartænastuna á tínum øki. Gev gætur, at tað altíð ber til at fáa fatur á barnaverndartænastunum kring landið, nátt sum dag.

## Fráboðan til barnaverndartænastuna

Stúrir tú av álvara fyri trivnaðinum heima hjá einum barni, skalt tú boða barnaverndartænastuni frá munnliga ella skrivliga.

## Nær er fráboðanarskyldan galdandi?

Um samrøður við foreldrini ikki bøta um støðuna hjá barninum, hevur tú skyldu at siga barnaverndartænastuni frá. Henda skylda er galdandi, sjálvt um málið møguliga er tikið upp í tvørfakligum samstarvi. Í slíkum førum kunnu tey, ið samstarva, koma við eini fráboðan í samráð við foreldrini. Fráboðanarskyldan er somuleiðis galdandi, sjálvt um tú hevur tosað við leiðsluna um tína stúran. Um einki hendir, og um tú framvegis heldur, at barnið hevur tørv á serligum stuðli, skalt tú boða frá.

Fólk, sum í sínum starvi hava við børn og ung at gera, eitt nú námsfrøðingar, lærarar og starvsfólk innan heilsuverkið, skulu í síni fráboðan vera navngivin.

## Hvat eigur ein fráboðan at fevna um?

Ein fráboðan eigur at fevna um so nógvar upplýsingar um barnið, sum til ber, sama um hon er munnlig ella skrivlig. Tað er sera umráðandi, at frágreiðingin er ítøkilig, og tann, ið skrivar, ikki tulkar umstøðurnar, men bara skrivar tað, sum beinleiðis er í samsvari við veruleikan.

## Hvat hendir, tá eg havi boðað frá?

Tá fráboðanin er komin, fer málsviðgerin hjá barnaverndartænastuni í holt við at kanna støðuna hjá familjuni og barninum nærri. Hóast tørvur kann vera á skjótari hjálp, er umráðandi, at møgulig fyriskipan verður framd við støði í eini neyvari vitan um viðurskiftini hjá familjuni. Um tørvur er á fyriskipanum, eitt nú við familjuráðgeving heima við hús ella við øðrum stuðulsfólki, umlætting ella at barnið verður sett heiman, verður skipað fyri serligari kanning, áðrenn slíkt verður sett í verk. Tá børn verða sett heiman, og tá skipað verður fyri stovnstilboði fyri familjum teirra, verður málið somuleiðis lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til endaliga støðutakan.

## Hvat kann eg vænta at fáa at vita?

Tú fært innan eina viku eina kvittan fyri, at barnaverndartænastan hevur móttikið fráboðanina.



„Er tú í iva, kanst tú altíð seta teg í samband við barnaverndartænastuna at fáa ráð og vegleiðing“

Barnaverndartænastan skal skipa fyri tvørfakligum samstarvi ímillum teir fakbólkar, ið kunna hava týdning fyri málið. Men um tú ikki ert partur í málinum í løgfrøðiligum týdningi, kanst tú ikki vænta at fáa upplýsingar um, hvussu barnaverndartænastan fer víðari fram. Málsviðgerin fer møguliga at seta seg í samband við teg aftur, um tørvur er á fleiri upplýsingum, men fyrst og fremst eru tað foreldrini, ið verða tikin upp í viðgerðina. Sostatt kann væl hugsast, at hjálp er sett í verk, uttan at fráboðarin verður kunnaður um hetta.

## Hvat geri eg, tá eg havi boðað frá?

Tá boðað er frá, kann ein kensla av tómleika valda, har tú ótilvitað roknar við, at nú liggur næsti leikur hjá barnaverndartænastuni. Fyri barnið er tað tó av stórum týdningi, at tú framvegis hevur serligt eyga við tí.

„Verðin er ein vandamikil staður. Ikki orsakað av teimum, ið gera tað ónda. Men orsakað av teimum, ið hyggja at uttan at gera nakað“

Albert Einstein

FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

Nærri kunning og upplýsingar um barnaverndatænasturnar kring landið
**www.bvs.fo**